Álit

í

løgtingsmáli nr. 2/2026: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti
(Hækking av orkuískoyti, inntøkumørkum og ognarmørkum)

Sámal Petur í Grund, Høgni Hoydal, Sirið Stenberg, Hervør Pálsdóttir, Eirikur í Jákupsstovu, Liljan Weihe og Bjørg Brynhildardóttir Egholm, løgtingsfólk, hava lagt málið fram 3. august 2026, og eftir 1. viðgerð tann 5. august 2026 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 5. og 11. august 2026.

Undir viðgerðin av málinum hevur nevndin havt fund við Landsfelag Pensjónista, Áhugabólk Pensjónista, felag hjá fyritíðarpensjónistum, Barnabata, Samtak, landsstýrismannin í fíggjarmálum, Aksel V. Johannesen, og landsstýriskvinnuna í almanna- og bústaðamálum, Margit Stórá.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Grímur Sundstein, Bjørt Lind, Magni Højgaard og Sunnvá Dahl Høgfeldt) hevur hesar viðmerkingar:

Skipanin við orkuískoyti hevur verið í gildi síðani 2024 og varð tíðaravmarkað til trý ár. Skipanin fer sostatt eftir ætlan úr gildi í ár (2026), og er umsóknarfreistin longu farin (30. juni).

Høvuðsendamálið við orkuískoytinum var upprunaliga at tryggja, at húski, sum hava lítla skattskylduga inntøku, ikki detta niðurímillum í sambandi við, at orkugjøld o.a. hækkaðu sum partur av skattaumskipanini í 2024.

Umframt orkuískoyti, so hevur eisini borið til at søkt um familjuískoyti, oljuískoyti og hjálparískoyti, men eins og við orkuískoyti so eru skipanirnar við oljuískoyti og hjálparískoyti farnar úr gildi.

Felags fyri hesi ískoytini er, at tey eru ætlað húskjum við lágari skattskyldugari inntøku, ið ikki hava ognir av týdningi. Hesin bólkur eru serliga lesandi, fólka- og fyritíðarpensjonistar, stakir uppihaldarar, ið arbeiða niðursetta tíð o.o.

Seinastu árini hava verið merkt av príshækkingum, serliga hækkandi oljuprísum, ið hava lagt størri trýst á føroysku húsarhaldini.

Í stóru spurnarkanningini 'hvussu hevur tú tað', sum Heilsustýrið gav út í 2025, sæst eisini, at ein stórur samfelagsbólkur av yngri fólki (25-34 ár) og barnafamiljum, er vorðin munandi meira "fíggjarliga viðbrekin" síðstu árini, har hesi m.a. kenna seg nógv tyngd av síni fíggjarstøðu og hava regluliga havt torført við at gjalda rokningar seinasta árið.

Verandi skipan við árligum hjálparpakkum, so sum oljuískoyti fyri 2022 (10.000 kr.), hjálparískoyti fyri 2023 (12.000 kr.) og orkuískoyti fyri 2024-2026 (10.000 kr., 5.000 kr. & 5.000 kr.), har eingangsupphæddir verða útlutaðar, tykist tískil ikki at vera rætta loysnin til at basa hesum afturvendandi trupulleika. Hesar veitingarnar taka einans útgangsstøði í inntøku og ogn, og ikki í tørvi

ella fíggjarliga rásarúmi hjá móttakaranum. Harafturat er onki grundarlag fyri, hví upphæddin er á verandi støði (5.000 kr.) ella grundgeving fyri hví, hon hækkar við júst 140% [12.000 kr.] og ikki meira ella minni.

Verandi ískoytisskipan er ikki haldbar og uttan grundarlag ella grundgeving fyri upphæddini, eru sannlíkindi fyri, at nýggj ískoytir skulu samtykkjast á hvørjum ári.

Tó eru aðrar veitingar, sum væntandi fara at koma hesum málbólki tilgóðar – m.a. hækkar lestrarstuðulin við 1.000 kr., tann 1. august, leigustuðulin er samtyktur og fær virknað frá 1. september, eins og arbeitt verður við at hækka mótrokningina hjá pensjonistum umframt at barnafrádrátturin hækkar stigvíst næstu árini. Sostatt eru átøk framd, og fleiri eru á veg, ið skulu bøta um fíggjarstøðuna hjá m.a. hesum bólki, sum hevur lága skattskylduga inntøku.

Samanumtikin metir meirilutin ikki, at skipanin við orkuískoyti er ein haldbar loysn. Landsstýrið fylgir nevnt við støðuni í samfelagnum, og um prísirnir á olju aftur hækka, og støðan gerst varandi, fer landsstýrið í heyst at taka støðu til um at veita hjálp til teirra, sum eru fíggjarliga sperd.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sámal Petur í Grund, Bjørg Brynhildardóttir Egholm og Liljan Weihe) hevur hesar viðmerkingar:

Tað er dýrt at liva, men seinastu árini er tað vorðið nógv dýrari at liva. Oljuprísirnir eru hækkaðir munandi í ár, tað er vorðið dýrari at fylla sær posan í matvøruhandlunum, og tað er dýrt at ogna ella leiga sær ein bústað.

Øll merkja hesar prísbroytingarnar, men hjá teimum, sum frammanundan hava eitt avmarkað fíggjarligt rásarúm, rakar prísvøksturin sera meint. Tey hava ikki somu møguleikar at leggja um til grønar og bíligari orkuskipanir ella ráð at keypa sær ein nýggjan el-bil.

Minnilutin ynskir at veita ein beinleiðis fíggjarligan stuðul til teirra, sum hava lægri inntøkur og onga ella lítla uppsparing. Fíggjarligi stuðulin er ikki beinleiðis tongdur at orkuprísunum ella ávísari nýtslu, men tað stendur móttakarunum frítt fyri at taka støðu til, hvat peningurin skal brúkast til.

I mun til mvg-frítøkuna av brennievni, sum samgongan setti í verk í summar, so rakar eitt hægri orkuískoyti sosialt rættvísari. Mvg-frítøkan kom øllum, sum koyra diesel ella bensin bil til góðar. Bæði há- og láglønt og sjálvsagt øll ferðafólkini, sum hava vitjað Føroyar í summar, hava merkt ágóðan av hesum. Men tað eru eisini mong, sum ikki hava fingið nakran ágóða. Øll tey, sum ikki hava bil ella ikki koyra nógv í bili, hava ikki merkt ágóðan av hesum. Og tá ongin króna er spard, er ongin króna eyka til hita, mat og klæðir hjá teimum, sum tørva.

Mvg-frítøkan av bensini og dieseli hjá samgonguni varð mett at kosta 20 mió. kr. Hækkingin av orkuískoytinum er mett at kosta 3,8 mió. kr. Altso uml. 1/5 av tí, sum mvg-frítøkan varð mett at kosta.

Fyri at veita ein miðvísan stuðul til teirra, sum veruliga tørva, verður inntøkumarkið fyri at fáa orkuískoyti hækkað frá 300.000 kr. um árið til 350.000 kr. um árið. Samstundis verður ognarmarkið

eisini hækkað frá 50.000 kr. til 70.000 kr. hjá húskjum, sum telja eitt ella tvey vaksin, og úr 70.000 kr. til 90.000 kr. hjá húskjum, sum telja trý vaksin ella fleiri.

Minnilutin heldur, at tað eru sera væl givnir pengar at veita teimum, sum veruliga tørva, ein fíggjarligan styrk, tað sum eftir er av árinum. Fyri 3,8 mió. kr. kunnu einstaklingar og húski við lágum inntøkum og lítlari ogn fáa 7.000 kr. afturat til hita, mat, klæði ella kanska eitt ískoyti til at skifta til eina aðra orkuskipan. Vit hava álit á, at húskini vita best sjálvi, hvussu hesin peningur gagnar teimum best.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin 28. august 2026

Grímur Sundstein
formaður

Sámal Petur í Grund
næstformaður

Bjørt Lind

Magni Højgaard

Sunnvá Dahl Høgfeldt

Liljan Weihe

Bjørg Brynhildardóttir Egholm